

*Sola á Viðareiði fekk óvæntaða vitjan henda hósdagin, tá systursonurin úr Gásadali kom á gátt. Her hyggja tey eftir "gomlum" myndum av heimbygdini soleiðis sum hon sá út í 80'unum*



*– Sonur mín eigur nakað av jørð her niðanfyri, sigur Sola. Jákup lurtar við áhuga*



*Í Kunoy er nógvur landbúnaður og nógv dyrkað jørð. Hetta hugtók Karl á ferðini. – Okkara tunnil skuldi bara komið um somu tíð sum kunoyingar fingu sín, sigur hann*

eftir tripp-teljaranum: 115,8 km. hava vit koyrt – tá er ein lítil umvegur í Klaksvík íroknaður. Sjálvur tunnilsvegurin – Mækjugøta ella Fluktvegurin sum onkur nevnir hann – er ikki liðugur enn. Har var arbeitt av allari megi, og tí máttu vit koyra ein lítlan umveg gjøgnum Klingrugarð.

– Jú, hetta var ein sera góður túrur og eitt stórt upplivilsi at kunna koyra allan henda langa vegin, og haraftrat gjøgnum 8 tunlar. Tað er ikki hvørt mans føri.

– Tit á Sosialinum hava sanniliga givið mær eina upplivilsi fyri lívið, sigur Karl takksamur á málinum.

**Skjótt norður aftur**

Vit fara innar í heimið hjá Karli. Vit mugu líka fáa tær seinastu viðmerkingarnar og myndirnar uppá pláss.

Karl hevur fylgt við gongdini innan tunnilsgerðir í Føroyum, og hann dugir væl at síggja týdningin av hesum tunlunum fyri menningina av føroyska samfelagnum – ikki minst Norðoyggjum!

– At gera tunlar, – tað er tað einasta rætta, staðfestir hann bara.

Hann er tó sannførdur um, at tunnilin til Gásadals kom ov seint. Kom hann ígjøgnum eini 15 ár frammanundan, hevði støðan kanska verið øðrvísi í Gásadali.

– So vóru helst fleiri ungfólk her í bygdini, sigur hann.

Ein tunnil skapar eisini menning bæði innan vinnulívið og ferðavinnuna, bara fyri at nevna nakað. Tað skapar trivna fyri bygdarfólkið – um hann altso kemur nóg tíðliga!

Tað hendi tíverri ikki hjá fólkinum í Gásadali, helst tí kreppan kom fyrst í nítiárunum. Tað er altíð tað góða fólkið sum fer fyrst av bygdini.

Nú hevur Karl, eins og eini 80% av Føroya fólki fingið møguleika at koyra til dyrnar hjá hvørjum øðrum.

Tað ætlar Karl sær eisini at gera brúk av í framtíðini. Tí, sum hann sigur:

– Tað skulu ikki ganga 20 ár aftrat inntil eg vitji mostur mína á Viðareiði!



*– Tað einasta rætta er at gera tunlar, sigur Karl, sum her er ávegis teir 115 km. til heimbygdina – ein ferð gjøgnum átta tunlar*